Sp/f Norðbil:

# Opið hús við nógvum góðum tilboðum




*Birgir og Frits Dam Jacobsen frá Norðbil eru klárir við nógvum góðum tilboðum leygardagin*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

**Tøkk**

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, tá góði maður, pápi, verfarðir og abbi okkara

**Hilmar Thomsen**
Fyrrverandi politistur
Klaksvík

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til Norðoya Røktarheim fyri tíðina hann var hjá tykkum.
Takk fyri blómur og kransar, og takk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jytte, Karl Johan og Anna**

**Tøkk**

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Erik Mortensen**
Øravík

doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Bønhúsið
Tøkk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Judith og børnini**

**Tøkk**

Takk øll tit, sum lótu okkum kenna hitan av samkenslu og umsorgan, tá ið elskaði maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Eyvindur Mohr**

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri øll somul.

**Nina, Turið og Gunnvør v/familjum**



*Skoda Superb frá 1934 við V8 motori og 90 hk. Ein av luksusbilunum fyri fyrra heimsbardaga*

**Í sambandi við at 100 ár eru liðin síðan fyrsti bilur bleiv gjørdur á Laurin & Klement verksmiðjuni í Kekkia, sum seinni bleiv til Skoda, verður nógv gjørt burtur úr á bilasøluni Norðbil við Oyggjarvegin**

TÍÐINDASKRIV

Opið hús verður á bilasøluni Norðbil við Oyggjarvegin leygardagin 25. juni frá kl. 9.00- 20.00 við nógvum góðum sertilboðum upp á nýggjar Skoda bilar (avmarkað nøgd).

25 prosent verða latin í avslættri upp á allar Skoda umvælingar í viku 26.

Eisini verða nógvir brúktir bilar seldir við stórum avslættri.

Kekkiska fyritøkan Laurin & Klement varð stovnað í 1895. Teir byrjaðu við at umvæla og framleiða súkklur. Í 1899 fóru teir undir framleiðslu av motorsúkklum, og í 1905 varð fyrsti bilurin, ein Voiturette A, sum bleiv ein stór succes, framleiddur.

Í 1925 varð fyritøkan løgd saman við stóru maskinfyritøkuni Skoda Pilsen, har verkfrøðingurin Emil Skoda var stjóri, síðan tá hava bilarnir borið navnið Skoda.

Síðan 1991 hava Skoda hoyrt til VW-konsernina, og Skoda eru so gott sum somu bilar sum Volkswagen. Verksmiðjan í Kekkia hevur stóran týdning fyri landsins búskap.

**Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin**

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**